# VARPIÐ



TV3 · Sunnudagin kl. 20.00

## Matchstick Men

**Roy og lærlingur hansara Frankie liva av at snýta fólk, men teir nýta altíð somu tryggu tricksini, tí Roy er eitt sindur fobiskur. Men so leingi hann tekur sín heilvág, so fungerar hann so hampuliga væl. Tá tvangstankar hansara byrja at gera fortreð av álvara, ger hann tó av at fara til sálarfrøðing, har hann brádliga kemur eftir, at hann eigur eina 14-ára gamla dóttur. Alt verður enn meira fløkt, tá dótturin verður hugtikin av "starvinum" hjá pápanum, og tí sjálv ynskir at verða partur av hesum.**



DR1 · Sunnudagin kl. 20.55

### Mit Danmark

Fyri einum ári síðani fekk Muhammed-kreppan dannebrog á alheims sjónvarpsskíggjan. Nú ætla DR og arabiska støðain Al Arabiya, at hyggjarin skal fáa eina øðrvísi fatan av lítla landinum. Í felag hava støðirnar framleitt dokumentarsendingina Mit Danmark, sum verður send samstundis á báðum støðum.
a



3+ · Mánadagin kl. 20.00

### Bandits

Bankarænararnir Joe Blake og Terry Collins eru flýddir úr geglinum, og nú ræður um at fíggja eina góða pensjón. Saman verða teir kendir sum "the Sleepover Bandits", og teir ræna ein banka fyri og annan eftir. Kinkur kemur tó í, tá teir hitta tí vøkru Kate Wheeler, sum er troytt av keðiliga lívi sínum. Hon legst afturat duettini, sum nú er ein trio, men hetta inniber eisini vandanum fyri einum tríkantsdrama.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

# Sosialurin

F R Í G G J A D A G U R 2 . F E B R U A R 2 0 0 7

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**